# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Karolinu Clementsen av Sandi

**f. 9. juli 1940 - d. 27. apríl 2006**

Tað kom óvart á okkum, tá vit fingu boðini um, at tú mín kæra systir var deyð.

Væl vistu vit, at tú var sjúk, men tú hevði fingið tað eitt sindur betur, so vit høvdu ikki væntað at tú fór so skjótt.

Saknurin er ómetaliga stórur, og tú hevur latið eitt stórt tómrúm eftir teg, tú fylti so nógv í lívi okkara, tí tú var altíð har fyri okkum. Tú var eitt so hjartagott menniskja og tú vísti kærleika til øll, sum tú hevði við at gera, soleiðis sum eitt Guds barn eigur at gera.

Men nú er tú heima hjá tínum Harra og Frelsara, sum tú elskaði, og har skulu vit báðar skjótt síggjast aftur og saman syngja lambinum prís. Eg sakni teg nógv, mín kæra elskaða systir, men eg unni tær so væl tann frið, tú nú hevur.

Heim tykkara hevur altíð verið væl vitja, bæði av familjunum og øðrum, og hví? Jú, tí at øll føldu seg væl inni hjá tykkum, tit vóru altíð líka blíð, bæði tú og Herman, har manglaði onki. Tú Karolina reiddi sengur og ból til gestirnar og helt atlíkavæl ongantíð at tú gjørdi nokk og Herman stákaðist í køkinum og hjálpti til við at gera mat til øll.

Sum ung var tú í Danmark og lærdi til syirsku, og tú brúkti tíni evnir til fulnar. Tú var so kreativ og helt títt heim so vakurt.



Tú bæði seymaði og bant uppá børnini, líka til tað síðsta. Eitt tíðarskeið arbeiddi tú eisini á hotellinum. Nei góða Karolina, títt arbeiði liggur ikki eftir, og so elskaði tú blómur og náttúruna í síni heild og gekk nógvar túrar.

Men so bleiv tú sjúk og orkaði ikki at ganga fleiri túrar, men stríddist bara fyri at yvirliva. Harrin sá at tú ikki orkaði meira og valdi at taka teg heim til sín, til hvílu og gleði. Harrin veit, hvat ið er best fyri okkum.

Ærað verið minni um mína elskaðu systir.

**Svanhild**

Mátti Harrin veri hjá tær Herman og tykkara børnum og styrkt tykkum í sorgini.

1.
*Eg vil syngja ein sang*
*um hitt signaða land,*
*um hin ljósa og skínandi stað,*
*har ei nakra tíð*
*stormur skal ýla um strand,*
*um hitt land, sum ei sorg hevur sæð.*
*Hetta landið eg ofta í andanum sá*
*og tann ljóma, sum skyggir um tað,*
*og tað mangan mær var,*
*sum ein toka bert lá*
*millum meg og hin glitrandi stað.*

2.
*Hetta sálana heim*
*er til tín og til mín,*
*vár æviga hvíld bíðar har;*
*Jesus stendur har uppi*
*og veitrar til sín.*
*Tann, sum fremmandur her niðri var.*
*Á tú lívsæla land! Aldri rennur eitt tár,*
*aldri hoyrist ein gremja í tær!*
*og við songi á munni í endaleys ár*
*skulu Harran vit tilbiðja har.*

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Heinrikur Norðbúð, Tórshavn**, andaðist á landssjúkrahúsinum sunnumorgunin 7. mai, 58 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á landssjúkrahúsinum heim í Ebenezer týskvøldið 9. mai kl. 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin 10. mai kl.13. Tey, ið vilja minnast Jógvan, kunnu lata eina gávu á kontu í Føroya Sparikassa.

**Haldór Olavson, Tórshavn**, andaðist á landssjúkrahúsinum sunnukvøldið 7. mai, 94 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Marianna Elleby, fødd Jacobsen á Oddafløtti í Vági**, búsitandi í Rødovre, andaðist á sjúkrahúsinum í Herlev leygardagin 6. mai, 71 ára gomul.

**Jytte Hansen, ættað úr Skive**, búsitandi í **Klaksvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum, leygardagin 6. mai, 68 ára gomul.

**Jógvan Heinrikur Norðbúð**
Tórshavn

andaðist á landssjúkrahúsinum
sunnumorgunin 7. mai, 58 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á landssjúkrahúsinum
heim í Ebenezer týskvøldið 9. mai klokkan 18.00.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin 10. mai
klokkan 13.00.

*Tey, ið vilja minnast Jógvan, kunnu lata eina gávu á kontu*
*í Føroya Sparikassa.*

## Motor 100 ár

28. apríl vóru 100 ár liðin síðan FDM limablaðið Motor kom út fyrsta ferð leygardagin 28. apríl 1906.

Hetta vóru trý ár áðrenn felagsskapurin FDM (Forenede Danske Motorejere) var stovnaður í 1909.

Í Motor verða nýggir bilar royndarkoyrdir, bæði í Danmark og í útlandinum, eisini verða og motorsúkklur og onnur akfør royndarkoyrd. Í hvørjum blað eru eisini frásagnir um ymisk ferðamál kring knøttin.

Í Danmark hava FDM nógv ymisk tilboð til bileigarar og onnur. Teir hava t.d. koyriteknisku royndarbreytina "Jyllandsringen", ferðaskrivstovur og kampinpláss kring alt landið, juridiska og tekniska ráðgeving, og støðir har limirnir kunnu fáa bilarnar eftirhugdar og testaðar.

Felagsskapurin hevur yvir 200.000 limir. Eisini í Føroyum hevur FDM fleiri limir. Onkuntíð hevur talið verið uppi á umleið 1.800 limum.




# Tøkk



Hjartans tøkk til tykkum, sum vitjaðu meg á 80-ára degnum. Tøkk fyri gávur, blómur, heilsanir og uppringingar. Eisini tøkk til tykkum, sum komu uttanlanda frá. Tøkk til tykkum, sum hjálptu til. Tøkk øll somul fyri ein minnisríkan dag.

**Bestu heilsanir**
**Klara Debes**